# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## FØÐINGAR



20. august fekk Benjamin, 3 ár, eina lítlasystur. Hon var 50 cm long og vigaði 3560 gr. Foreldrini eru Sølvi Viola Frederiksen og Frói Jacobsen, Ålesund



Hesa fittu didduna fingu Edith og Jarnhold Nattestad, búsitandi í Noreg, tann 21. juli. Hon vigaði 3300 gr. og var 48 cm long. Hon eitur Kristina.

10. august fingu Jóhanna og Bogi Andreasen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3450 gr.

19. august fingu Andrea Eldevig og Jógvan Philbrow, Fuglafjørður, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3600 gr.

20. august fingu Aina Leitisstein Knudsen og Magni Olsen, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4000 gr.

20. august fingu Chutimon Prommai og Petur Sigurd Petersen, Skála, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3600 gr.

21. august fingu Malan og Petur Elias á Svínafløtti, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 2780 gr.

21. august fingu Bárða Brandsdóttir og Heini Tausen eina dóttur og Helgi er blivin stóribeiggi. Hon var 53 cm. long og vigaði 3850 gr.

21. august fingu Rúna Løkságarð og Hjalmar Josephsen, Klaksvík, ein son. Hann var 48 cm. langur og vigaði 2650 gr.

21. august fingu Thurid í Buð og Atli S. Justinussen, Árnafjørður, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3950 gr.

23. august fingu Birna S. Eyðsteinsdóttir, Tórshavn og Høgni á Lofti, Sandavágur, eina dóttur. Hon var 53 cm.long og vigaði 3610 gr.

23. august fingu Tove og Dávur Nielsen, Skipanes, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3700 gr.

24. august fingu Helena Debes Højgaard og Jógvan Páll Fjallsbak, Keypmannahavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3900 gr.

24. august fingu Nancy og Pauli Poulsen, Innan Glyvur, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4100 gr.

25. august fingu Pernille Mittún og Mohsen Darvishi, Tórshavn, eina dóttur.Hon var 52 cm. long og vigaði 3075 gr.

25. august fingu Rannvá Hansen og Rói Snorrason, Tórshavn ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4475 gr.

25. august fingu Helga Johnsdóttir og Jákup Pauli í Eyðansstovu, Sandavágur eina dóttur ið eitur Eydna. Hon var 55 cm. long og vigaði 4225

## ANDLÁT

**18. august**
John Hansen, vanliga nevndur John á Brúnni, Fuglafjørður, 80 ár.

**19. august**
Einar Mortensen, Klaksvík, 81 ár.

**22. august**
Andreas Skipanes av Skipanesi, 92 ár.

**23. august**
Jóannes á Líðarenda, Nes, 65 ár.

## Kaj Leo Johannesen 40 ár



Í dag, leygardagin 28. august, eru fjøruti ár síðani, at Kaj Leo Johannesen í Havn varð føddur. Hann hevur í mong ár verið almennur persónur. Fyrru árini var tað sum málverji hjá HB, og seinastu tíðina hevur tað verið sum politikari og nú formaður í Sambandsflokkinum.

Kaj Leo er sonur Karina, sum var fødd Holm Jacobsen, og Leo Hans Johannesen. Tey eru bæði ættað úr Mykinesi. Leo Hans doyði í syndarligu bátsvanlukkuni í Mykinesi fyri skjótt trettan árum síðani. Tey eru fimm systkin, Kaj Leo er næstyngstur, og hann er einsamallur beiggi. Liss Jacobsen og Marin Rasmussen búgva í Havnini, Jacobina Hansson býr í Hoyvík, og Oddvør Mohr, sum er tann einasta, ið er yngri enn Kaj Leo, býr í Havnini.

Kaj Leo var blaðungur, tá ið hann fór til skips, og hann sigldi í fleiri ár, eitt nú við línuskipum í langfarasigling. Síðani fór hann upp á skúla og leyk skipsførara-prógv. Tað var kortini skjótt, at hann legðist uppi. Hann seldi bilar fyri Reyni Service, áðrenn hann aftur fekk samband við fiskin. Fyrst var tað á Føroya Fiskasølu, sum tá framvegis var risin í føroyskum vinnulívi, so var tað á Kósini í Klaksvík, har hann segði seg trívast ógvuliga væl, og nú hevur hann í fleiri ár saman við øðrum rikið fyritøkuna Farex, sum eitt nú fæst við at selja fisk. Kaj Leo eigur hesa fyritøkuna saman við øðrum.

Áðrenn hann fór til skips, hevði Kaj Leo spælt fótbólt við HB. Tá ið hann legðist uppi, leitaði hann málmanshandskararnar framaftur, og tað var skjótt, at hesin stríðsmaðurin við vinnarasinninum, og sum samstundis er so sera fryntligur og vinsælur, hevði vunnið seg á besta HB liðið, og har stóð hann í meiri enn eitt tíggju ára skeið. Hann var eisini á landsliðnum. Oftast sat hann á beinkinum, men hann hevur verið við í fýra altjóða skrásettum landsdystum.

Á kommunuvalinum í 1996 varð Kaj Leo valdur í Tórshavnar býráð fyri Sambandsflokkin. Men hann stillaði ikki uppaftur, tá ið kommunuval var fýra ár seinni. Kaj Leo er heilur, har hann er, og hann segði seg ikki trívast nakað serligt við kommunalpolitiska arbeiðnum, sum ikki er roknað at fylla so ógvuliga nógv hjá vanliga býráðsliminum.

Hugurin til politiska arbeiðið var kortini framvegis har, og á valinum í 2002 varð Kaj Leo Johannesen eykavaldur løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin í Suðurstreymi. Lisbeth L. Petersen og Heðin Mortensen vóru valdømisvald. Á valinum í januar í ár gekk ikki so væl hjá Sambandsflokkinum í Suðurstreymi. Men tað gekk væl hjá Kaj Leo. Hann varð fyrst valdur á sambandslistanum.

Síðani hevur tað gingið við miklari ferð. Tá ið Lisberth L. Petersen tók seg aftur sum formaður í flokkinum, bjóðaði Kaj Leo seg fram. Tað varð tosað um onnur formansevni, men støðan í flokkinum var soleiðis, at tað varð mett vera best fyri flokkin, at bara eitt evni var, sum kundi kjósast sum formaður, og tað var Kaj Leo. Hann má sigast bæði í sinn og skinn at vera eitt heilt øðrvísi slag av sambandshøvdingi, enn teir frammanundan hava verið. Nú hevur hann fingið stóra politiska avbjóðing. Honum líkar væl avbjóðingar, og so fæst at síggja, hvat fer at spyrjast burturúr.

Kaj Leo er giftur við Jórun Bærentsen úr Havnini. Tey eiga tveir dreingir - Heini og Jákup.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu tá kæra mamma, vermamma, omma og systir okkara

**Katrin Rein,**
fødd Joensen

doyði og varð jarðað.

**Unn og Lars**

**Kasper, Frederik og Mathilde**

**Óluva, Eyðbjørg, Magnus Pauli og Helgi**

†

**Ólafur Guðmundsson**

andaðist í Keflavík mikudagin 18. august
91 ára gamal.

Bønarhald verður í Havnar kirkju
mikudagin 1. september kl. 13.00

**Jana**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæri maður, pápi, verpápi og abbi

**Gunnar Christiansen**
ættaður av Skála, búsitandi í Reykjavík

so brádliga andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til familju, vinir og kenningar og øll tykkum, sum mintust Gunnar og tykkum ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Heilsan*

**Frida & Elisabet v/ familju**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt vístu samkenslu, tá okkara góða kona, mamma, vermamma og omma

**Beinta Biskopstø**

doyði og varð jarðað.

Tøkk til tykkum, sum trúføst vitjaðu Beintu á longu sjúkralegu hennara, og tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu Beintu til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*

**Sverri**

**Marjun, Rakul, Jógvan og Óluva**



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Minningarorð um Frederikku Høgnesen



Hósnáttina 12. august andaðist Jóhanna Frederikka Høgnesen í Klaksvík eftir stutta sjúkralegu. Hon var 86 ára gomul, nú hon legði eyguni saman.

Tað er nú einaferð lívsins gongd, at tá tú sjálv røkkur at miðjum aldri, fara tey fólkini, sum tú altíð hevur kent, so smátt at falla frá - tað er eins og grundstuðlarnir ridla undir tær, hvørja ferð onkur av teimum fer. Soleiðis er eisini nú, Jóhanna Frederikka er farin í Harrans hendur.

Her í Klaksvík varð hon kallað Jóhanna, men norðuri við Gjógv, haðani hon var slektað, kallaðu tey hana við báðum nøvnum og tað hava vit eisini altíð gjørt í okkara húsi. Hetta kom ivaleyst einamest av, at foreldur míni vóru slektað úr grannabygdini Funningi og kendu Jóhonnu Frederikku har norðuri frá, men eisini tí, at Jóhannurnar vóru fleiri í grannalagnum og í ættini annars.

Hetta grannalagið, sum fyrr varð kallað á Heygum, stendur beint uttanfyri teir gomlu bøgarðarnar í Gerðum, sum fáur longur veit um. Her bygdu Jóhanna Frederikka og Christian sær hús fyri meira enn fimmti árum síðan, tá tey gingu í hjúnalag, og skaptu har eitt fjálgt heim fyri báðar døturnar Kristinbjørg og Jórun. Tey høvdu tað gott saman og Christian hevur verið ein sera góður konumaður í orðsins sanna týdningi.

Tá vit vuksu upp, var hetta eitt hugnaligt og lívligt grannalag. Her vóru børn í hvørjum húsi og eyðkent var, at fólk, kanska serliga menninir, stóðu uttanfyri og prátaðu - ein mynd, ið nú næstan er horvin. Grannalagið broytist í hesum árum so skjótt. Fólkini fækkast - nógva staðni eru bert eitt í hvørjum húsi og børnini eru fá. Tað vil so vera, at fólk eldast og fara hiðani.

Ikki ber til at siga, nær eg fyrstu ferð kom á gátt hjá Jóhonnu Frederikku og Christiani - eg veit bara, at eg havi verið ógvuliga ung, ja, havi neyvan vitað til mín. Í barnaárunum var eg hvønndagsgestur har. Hvønn morgun vóru fyrstu spor niðan at spyrja eftir Kristinbjørg, so vit kundu fylgjast oman í skúla, og um kvøldarnar sótu vit mangan antin har ella hjá okkum og gjørdu skúlating, skrivaðu blekkrokning inn, skrivaðu stíl o.s.fr. Aldrin troyttaðist Jóhanna Frederikka av okkum. Hon var lagalig, men kundi eisini vera avgjørd, tá ið á stóð. Hon hevði stóran áhuga fyri øllum, vit tókust við og var altíð við tí góða orðinum. Eg havi altíð kent tað, sum hevði hon umsorgan fyri mær. Hon var ógvuliga blíð at koma inn til - ja, tað var hon til sín doyggjandi dag.

Tað, sum eg fyrst og fremst fari at minnast Jóhonnu Frederikku fyri, var hennara stóra áhuga fyri lærdómi. Í uppvøkstrinum eggjaði hon døtrum sínum til at gera nógv við skúlatingini og øll børn, sum komu innar, fingu við á vegnum hennara eggjandi orð um at royna at fáa sær onkra útbúgving. Hon hoyrdi sjálv til tað ættarlið, ið ikki fekk høvi til at útbúgva seg, hóast hon hevði gávur til tað.

Eitt annað eyðkenni fyri hana var, at alt skuldi vera gjørt av einslistum. Hon kundi tikið kenda orðatakið til sín, ið sigur, at alt, sum er vert at gera, er vert at gera væl. Og har sampakkaðu hon og Christian sera væl, tí hann er hegnigur og vælgjørdur sum fáur. Tískil er heim teirra fyrimyndarliga væl umsitið. Hon fór eisini sera væl við øllum og røkti sítt heim til lítar.

Jóhanna Frederikka var ikki likamliga sterk, lítil var hon av vøkstri, men so mikið størri var hennara andaliga styrki. Mangan havi eg undrast á, hvussu hon mentist, tá brúk var fyri henni. Hon hevði dygga barlast heimanífrá og visti, hvat hon hevði at byggja á. Somuleiðis hevði hon eitt frálíkt minni, sum onki var viknað, hóast árini vóru komin. Í køkinum hjá teimum hongur eitt fitt lítið skelti við áskriftini »Fjálgur er móður andi«. Og tað er bæði vist og satt, at fjálgt var innanveggja, har hon ráddi. Tómligt er at koma inn, nú hennara sessur stendur tómur.

Hetta kvøldið, hon lá og stríddist, var eitt so frágera vakurt summarkvøld í Klaksvík. Bæði Vík og Vág lógu speg-ilsblankar og sólin sá - tað var eins og í sanginum, sum bygdarmaður hennara Bernhard Brim á sinni yrkti. Roðin fór um Nestindar og hvørt fjall skein eins og reyðargull.

Og júst sum stjørnurnar komu fram á klára bláa náttarhimmalin og blunkaðu blítt niður yvir hendan vakra heimstað okkara, andaðist Jóhanna Frederikka og fór til teir ævigu bústaðir, har ongin pína og sorg er.

Í takksemi fyri alt, ið hon var fyri meg, sendi eg Christiani, Kristinbjørg og Jórun og øllum teirra mínar bestu heilsur við djúpari samkenslu. Hvíl í friði, góða Jóhanna Frederikka!

**Nicolina**

## Minningarorð um abbasystur mína Onnu Joensen, Sumba



Stødd uttanlanda frætti eg, at mín kæra abbasystir var farin, 92 ára gomul. Hetta var ikki óvæntað, seinast eg var har suðuri og heilsaði uppá hana miðskeiðis í juli mánaði, sást týðiliga, at hon var viknað, var vorðin móð. Hetta er sjálvsagt ikki so løgið, havandi í huga at hon var so gomul, men satt at siga hugsaði eg næstan ikki um aldur, tá ið vit sóust, tí hon var so livandi.

Var so forvitin, spurdi eftir børnum mínum, og hvat eg tókst við og mangt annað. Hon var ein, sum tú altíð fórt ríkari út frá, hetta við at grenja og beklaga seg, tað lá ikki til hennara. Hoyri hana fyri mær siga »at stúra tað nyttar onki«.

Meðan eg lati tankarnar sveima á feriustaðnum, er tað so nógv, ið kemur fram fyri meg.

Hon hevur altíð verið til í mínari verð, havi so nógv góð barnaminnir bæði úr Vági og ikki minst úr Sumba.

So hendi tað, at lív okkara fekk eina so løgna samanrenning. Tann dagin eg stóð brúður, misti hon mannin, sum gekk burtur á sjónum, og tung vóru míni fet, tá vit á veg úr kirkjuni í Samkomuhúsið steðgaðu á heima hjá Onnu. Og seint fari eg at gloyma løtuna inni hjá henni, har klædningurin hjá Tummasi hekk til reiðar at fara í brúdleyp um kvøldið. So orðatakið, »at ongin veit á morgni at siga hvar ein á kvøldi gistir« komu vit øll at ásanna.

Aftan á hetta vil eg siga, at millum okkum báðar bleiv eitt serstakt samband.

Mær dámdi so væl at vitja hana og fáa hana at greiða frá, sjálvsagt aftaná ein drekkamunn, tí blíð var hon sum fáur. Hon hevði jú upplivað so nógv í sínum lívi og væl lá fyri at fortelja, hóast hon sjálvt ikki helt tað vera so áhugavert.

Hon gjørdist mín stóra fyrimynd, og eg sakni orð, ið veruliga kunnu lýsa hesa megnar kvinnu. Eg eri ótrúliga takksom fyri, alt okkum untist at hava saman. Hon gav mær so nógv, og vóni eg at tá eg havi hug at fella í fátt, at eg tá kann minnast og læra av øllum tí ríkidømi, hon gav víðari.

Hon var so røsk, hevur altíð arbeitt nógv. Fødd í lítlari bygd Víkarbyrgi, har ikki ein gongd var vegasamband, tíansheldur allir teir hentleikar vit í dag nýta, uttan at hugsa um tað, og tann lætta hetta førir við sær í gerandisdegnum.

Hon fekk nógv børn og tveir ommusynir, sum vuksu upp hjá henni. Inni hjá henni vóru altíð nógv fólk, sum ein ofta sær hjá slíkum fólkum, sum útstrála slíkan nærleika og umsorgan fyri øðrum menniskjum. Hon var so altumfevnandi, var so góð við øll, sá altíð tað góða í øðrum. Var altíð so glað og væl nøgd við lívið.

Ikki tí, hon hevði fingið nógv bakkøst gjøgnum sítt langa lív, ikki bara tíðliga einkja, men upplivdi ta stóru sorg at missa eina dóttur í bestu árum. Eisini ein ommuson sum var tannáringur, somuleiðis sjúku og annað. Hóast alt hetta, ja so megnaði hon at reisast hvørja ferð og síggja eina meining og gleði við lívinum.

Hon gjørdi onki hóvasták burtur úr sær, heldur ikki nú hon lá á sjúkrahúsinum; henni líkt hugsaði hon fyrst um øll hini. Komið at hugsa um, tá hon fekk skift mjødnina fyri nøkrum árum síðani og læknin ansaði ikki eftir, hvussu gomul hon var, visti ikki um hann hevði lagt hana undir skurð, so gamla konu. Tað var heldur ikki av ongum, at sami lækni kallaði hana fyri »jarnkvinnan«, uttan nakað fyri pínu, stríddi hon seg fram og vann heilsuna aftur í fleiri ár. Jú, víst hevði hann rætt, hon var ikki ein og hvør, hon var nakað heilt serligt.

Tað verður løgið at koma suður aftur, og hennara stólur er vorðin tómur, røddin er tagna, áranar lagdar inn. Og kann eg lítið ætla saknin hjá tykkum, sum dagliga vóru um hana, mína djúpastu samkenslu viðtykkum øllum.

Hóast saknin og sorgina, eiga vit øll at vera sera takksom fyri øll tey góðu minni og hugnaligar løtur, sum vit hvør sær eiga eftir hana. Og finna troyst og ugga í øllum, hon gav og ríkaði tilveruna fyri so mong í hennara langa lív.

Hon er nú farin, og vita vi øll, sum vóru um hana, at nú var hon móð, og tilreiðar at fara herfrá í sínari góðu gomlu Guðstrúgv, í tann himmal hon trúði uppá og møta øllum sínum kæru.

*Stille, ak stille gik solen ned,*
*nu sluttet er arbejdsdagen.*
*Hjælpende hånden ej rækkes os mer,*
*Så tungt for os falder slaget.*
*Herre, hav tak for dit store lån,*
*minderne lyse forbliver.*
*Svaret på livets store hvorfor,*
*Evige fader, du giver.*

Við allarstørstu virðin og takksemi fari eg við hesum at lýsa frið yvir minnið um mína kæru abbadid.

**Bjørghild**

## Dagurin

**28. august. Augustinus,** deyður ár 430. Føddur í Tagaste í Norðurafrika. Eftir mongum ymiskum vegum gjørdist hann kristin og endaði biskupur í Hippo í Norðurafriku. Hann doyði tá ið vandalakongurin Geiserik kringsetti staðin. Augustin var mætasti kiskjulærarin í fornkirkjuni og hevði tær komandi øldirnar mikla ávirkan á kristna heimspeki og guðfrøði.
Navnið Augustus er latínskt og merkir *hin hátt upphevjaði.*

**29. august. Jóhannes hálshøgdur.** Dagurin hildin til minnis um at Heródes læt Jóhannes Doyparan hálshøgga.
*Samveldissáttmáli varð gjørdur í Bergen millum Noreg og Danmark hendan dagin í 1450.*

**30. august. Benjamin.** Dagsins navn sipar til yngsta son Jákups við Rakul, (1. Mós. 35,18).
Navnið merkir *eydnusonur*.